**Klaksvíkar Sjúkrahús og Heilsumálaráðið**

# Mál- og avrikssáttmáli

2012

**Mál- og avrikssáttmáli fyri 2012**

**Hesin mál- og avrikssáttmáli er millum Klaksvíkar sjúkrahús og Heilsumálaráðið**

Sáttmálin byggir á tey tøl og úrslit hjá Klaksvíkar sjúkrahúsið, ið vit kenna í dag. Mál og avrik verða tikin við í tann mun vit meta at tað er gjørligt at gjøgnumføra hesi mál, ella har møguligt er at røkka málinum. Stutt sagt, sáttmálin skal vera realistiskur og tað skal vera møguligt at staðfesta um mál eru rokkin.

Sum fyrimynd fyri aðrar stovnar, ynskir Klaksvíkar sjúkrahús, eisini framyvir at,

- slóða fyri, ganga nýggjar leiðir og vísa á møguleikar innan heilsuøkið
- hava nøgd viðskiftafólk
- hava nøgd starvsfólk

**Misjón:** - at vera ein stovnur, ið sær til, at sjúklingurin fær best møguliga hjálp og ráðgeving á stovninum sjálvum, men at vit eisini kenna okkara ábyrgd, um sjúklingurin verður sendur aðrastaðir til viðgerðar.

**Visjón:** - at liva upp til okkara umdømi har sjúklingar, starvsfólk og onnur viðskiftafólk, framhaldandi eru nøgd við okkara avrik. Eitt avrik, ið skal avspegla ein starvsfólkabólk við høgum fakligum førleika, empati og virðing. Dygd og áræði skal eyðkenna starvsfólkaliðið.

**Fyritreyt og fokus:** Skulu málini og visjónirnar røkkast, er neyðugt at vit áhaldandi fokusera á neyðugar broytingar, betraðar sjúklingagongdir og betur samskifti við sjúklingar og avvarðandi, t.d. við implementering av kontaktpersónaskipan. Hetta krevur so aftur, at útbúgvingarstøðið hjá starvsfólkunum verður uppstigað, og at førleikamenning sum heild er í fokus.

Onnur øki, sum framhaldandi kann arbeiðast við, eru:
- mannagongdir í samband við “feilmedisinering”
- betur samband við Nærverkið í samband við útskrivingar
- stuðlað undir granskingarverkætlanum við atliti til starvsfólk, ið útbúgva seg

Játtanin hjá Klaksvíkar sjúkrahúsið er 62.6 mió.kr. í 2012.

| ***Mál og átøk 2012*** | ***Arbeiðsháttur*** | ***Tíðarætlan*** | ***Ábyrgd*** |
|---|---|---|---|
| Fíggjarætlan liðug við ársbyrjan | Uppfylging og tillaging leypandi | 2012 | HMR og KS |
| Menningarætlan | Deildarleiðarar útbúgvast | 2012 og framyvir | KS |
| THS | Tillaging og rest implementering | 2012 og framyvir | KS /THS-toymið |
| Framhaldandi tillaging til broyttar umstøður (Tunnil / kommunulæknaskipan) | Tillaging í rakstrinum | 2012 og framyvir | Klaksvíkar Sjúkrahús |
| Heimtøkuverkætlanir | Halda fram at kanna serøki. Meta um møguleikar eru um heimtøkur | 2012 og framyvir | KS og HMR |

**Klaksvíkar Sjúkrahús hevur hesi ítøkuligu mál fyri ymisk lyklatøl í 2012:**
(tey somu sum fyri 2010/11)

| **Virksemi** | **2010** | **M2011** | **M2012** |
|---|---|---|---|
| Innleggingar | 1.694 | 1.800 | 1.800 |
| Skurðviðgerðir | | 700 | 700 |
| Skaðastovuvitjanir, eftirviðgerðir, kir. | | 4.500 | 4.500 |
| Medisinsk ambulatoriir | | 2.500 | 2.500 |
| Røntgenkanningar | 5.434 | 5.500 | 5.500 |
| Rannsóknarstovukanningar | 125.639 | 110.000 | 110.000 |
| Fysiurgiskar viðgerðir | 18.350 | 20.000 | 20.000 |

| ***Onnur mál og átøk í 2012*** | ***Arbeiðsháttur*** | ***Tíðarætlan*** | ***Ábyrgd*** |
|---|---|---|---|
| Byggimál | Bygginevnd (fundir) | Politiskt treytað | HMR / Klaksvíkar Sjúkrahús / Landsverk |
| Viðlíkahaldsætlan | Samstarv við Landsverk | 2012 og framyvir | KS / Landsverk |
| Betur hagtøl | THS | 2012 og framyvir | KS / THS-toymið |
| Neyv fíggjarstýring | Sundurgreining í smálutir (deildir/starvsfólk) | Leypandi framyvir | KS |
| Samstarvsmøguleikar innan heilsuverkið | Samstarvsavtala / stjórafundir | Leypandi framyvir | KS / LS / SS / HMR |
| Uppfylging av áheitanum frá grannskoðara | Deildarleiðarar Fyrisiting Fundir | 2012 | KS |

**Sáttmálaskeið**

Sáttmálin er galdandi fyri alt árið 2012.

Eftirmeting verður gjørd saman við aðalstjóranum í Heilsumálaráðnum á heysti 2012.

Klaksvík 22. mai 2012

| **Klaksvíkar Sjúkrahús** | **Heilsumálaráðið** |
|---|---|
| _________________________ | _________________________ |
| Heri Ellingsgaard, sjúkrahússtjóri | Poul Geert Hansen, aðalstjóri |